# Alneyðugt at tilbúgvingin virkar

**TILBÚGVING** - Tá vanlukkan hendir, og brúk er fyri skjótari hjálp, er alneyðugt, at tilbúgvingin er tøk. Farna ár fekk ein maður stóran skaða umborð á skipi, har brúk var fyri tyrlu, men tíverri endaði syrgiliga vanlukkan við, at maðurin doyði, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, sum hevur sett Jacobi Vestergaard viðkomandi spurningar um tilbúgving

Vilmund Jacobsen

Løgtingsmaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, hevur nú sett landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, skrivligan fyrispurning um viðurskiftini við hjálpar-og vaktarskipunum, Tjaldrinum og Brimli, nú tað sansar at við játtan til olju til skipini. Hetta hevur longu nú ført við sær, at skipini sigla minni, og alt bendir á, at siglingin í komandi ári eisini verður skerd munandi. Skipini hjá Fiskiveiðieftirlitinum eru soleiðis ikki før fyri til fulnar at røkja sínar eftirlitsuppgávur á havinum.

Løgtingið hevur samtykt, at fyrispurningurin hjá sjálvsstýrismanninum skal svarast, og vanliga kemur eitt slíkt svar eftir skipanini við skrivligum fyrispurningum um einar tríggjar vikur ella so.



*- Er støðan nøktandi, tá Tjaldrið og Brimil stóran part av árinum ikki kunna røkja eftirlitið á havinum vegna sparingar, og peningur tí ikki er tøkur til keyp av olju, spyr Kári P. Højgaard*

## Seks spurningar

Tað er eingin loyna, at skrivingin í Sosialinum í hesi vikuni, har vit í fyrsta lagi høvdu samrøðu við Jóhan Simonsen, fulltrúa á Fiskiveiðieftirlitinum og síðan við Jacob Vestergaard, landsstýrismann í fiskivinnumálum, hevur havt sín týdning fyri, at Kári P. Højgaard hevur reist hesar fyrispurningar.

Í fyrsta lagi spyr løgtingsmaðurin, um landsstýrismaðurin kann veita vissu fyri, at trygdarviðurskiftir og tilbúgving eru í lagi, so skip og bátar í føroyskum sjógvi fáa neyðuga hjálp, um óhapp ella vanlukka skuldi hent?

Kári spyr eisini, um landsstýrismaðurin heldur, at støðan er nøktandi, tá Tjaldrið og Brimil stóran part av árinum ikki kunna røkja eftirlitið á havinum vegna sparingar, og peningur tí ikki er tøkur til keyp av olju?

Í triðja lagi spyr hann um roknast kann við, at Vaktar- og Bjargingartænastan kemur í somu óvirðiligu støðu komandi ár vegna væntandi játtan á fíggjarlógini til rakstur.

## Eisini um tyrlu

Løgtingsmaðurin spyr eisini um tyrluviðurskiftini.

Í fyrsta lagi spyr hann, um landsstýrismaðurin heldur støðuna vera nøktandi, og um trygdin er í hásæti, tá eingin fult útgjørd bjargingartyrla er tøk í fleiri vikur.

Í øðrum lagi spyr Kári P. Højgaard, um landstýrismaðurin kann upplýsa, nær danska verjuskipið í føroyskum sjógvi aftur fær eina tyrlu?

- Og nær verður føroyska bjargingartyrlan tøk, vil løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins eisini hava at vita frá Jacobi Vestergaard, landsstýrismanni.

> **... serútgjørda bjargingartyrlan stendur »grounded«...**
> KÁRI P. HØJGAARD

## Skjót hjálp

Í viðmerkingum til skrivliga fyrispurningin, vísir løgtingsmaðurin á, at Føroyar eru ein fiskivinnutjóð, og at fá lond í heiminum eru so nær knýtt at havinum sum Føroyar, og framhaldandi er fiskur og fiskaúrdráttir okkara høvuðsvinna.

- Allahalgannardagur er júst farin afturum. Hetta er dagurin, tá vit árliga fáa áminningina um, at havið tekur og havið gevur. Prísurin er høgur, og mangan er talan um garpar í bestu árum, sum farna árið drógu andan fyri seinastu ferð umborð á skipi – ella hesir fingu eina kalda, váta grøv.

Kári P. Højgaard vísir eisini á, at tá vanlukkan hendir, og brúk er fyri skjótari hjálp, er alneyðugt, at tilbúgvingin er tøk.

- Farna ár fekk ein maður stóran skaða umborð á skipi, har brúk var fyri tyrlu, men tíverri endaði syrgiliga vanlukkan við, at maðurin doyði, sigur hann.

Løgtingsmaðurin vísir á, at seinasta hendingin var, tá útróðrarbáturin Oddny fór at leka og sendi út neyðarkall.

- Tíbetur vóru partrolarar á somu leið og komu neyðstadda bátinum til hjálpar og fingu bjargað manningini, áðrenn báturin sakk, leggur hann aftrat.

## Eingi skip

Løgtingsmaðurin leggur aftrat, at serútgjørda bjargingartyrlan stendur "grounded", sum hann tók til, og tí kundi hon ikki nýtast, tá Oddny sakk.

- Sambært Norðlýsinum var danska sjóverjuskipið Triton á staðnum, men einki sást til Brimil og Tjaldrið.

Kári P. Højgaard leggur dent á, hvussu alneyðugt tað er, at tilbúgvingin virkar, tá brúk er fyri skjótari hjálp.

- Tí havi eg gjørt av at seta landsstýrismanninum hesar spurningar fyri at fáa greiði á hesum álvarsmálum, sigur hann.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Smátoskur og hýsa sama prís

**MARKNAÐUR** Miðalprísirnir á toski 4 og hýsu 2 eru júst teir somu. Hetta er helst ein orsøkin til, at áhugin fyri tí smáa toskinum er so stórur, nú so nógvur ungfiskur er uppi í veiðini

Vilmund Jacobsen

Í gjár seldi Fiskamarknaður Føroya góð 200 tons av fiski á uppboðssølu fyri góðar 2,6 miljónir krónur tilsamans.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var 13,04 krónur fyri kilo. Besti prísur var fyri 200 pund av kalva, sum fóru fyri slakar 70 krónur fyri kilo.

Størstu einstøku nøgdirnar á uppboðssøluni í gjár var toskur 4. Her fóru 23,5 tons fyri miðalprísin 13,46 krónur fyri kilo. Hin besti toskurin fór fyri miðalprísin 22,69.

Sløk 15 tons vóru eisini av hýsu 2, sum fekk miðalprísin 13,45.

Prísirnir á hýsu 2 og toski 4 eru soleiðis á leið teir somu, og er hetta ivaleyst ein orsøkin til, at áhugin fyri tí smáa toskinum er so stórur, nú so nógvur ungfiskur er uppi í veiðini hjá skipum og bátum.

Á Fiskamarknaði Føroya í gjár vóru eisini sløk 30 tons av brosmu og eini 36 tons av longu. Bestu miðalprísir her vóru fyri brosmu 7,82, og besti miðalprísurin á longu var 13,63.

Eini 14 tons vóru av havtasku, og her fór eingin miðalprísur niður um 27 krónur.

Fiskamarknaður Føroya seldi eisini 11 tons av kongafiski. Mest var av kongafiski 2, sum fekk miðalprísin 9,18 krónur fyri kilo.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var í gjár 13,04 krónur fyri kilo. Góð 200 tons fóru fyri góðar 2,6 miljónir krónur tilsamans*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*